# *Formansfrágreiðing*

# 2010-2011

*Til aðalfund Ítróttasamband Føroya 28. mai 2011*

Tú alfagra land mítt,
mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt,
á sumri við logn,
tú tekur meg at tær
so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar,
Gud signi tað navn,
sum menn tykkum góvu,
tá teir tykkum sóu.
Ja, Gud signi Føroyar, mítt land!

Hin roðin, sum skínur
á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir
mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir
mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir
mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna,
sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

Eg nígi tí niður
í bøn til tín, Gud:
Hin heilagi friður
mær falli í lut!
Lat sál mína tváa
sær í tíni dýrd!
So torir hon vága
– av Gudi væl skírd –
at bera tað merki,
sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

## Starvsnevndin

*Forseti:* Petur Elias Petersen
*Varaforseti:* Petur Ove Petersen
*Skrivari:* Katrin Joensen

## Starvsfólk

*Ítrótta- og ungdomsráðgevi:* Annika H. Lindenskov

## Stjórnin


*Forseti:*
Petur Elias Petersen


*Varaforseti:*
Petur Ove Petersen


*Skrivari:*
Katrin Joensen


*FSF:*
Christian F. Andreassen


*HSF:*
Kristian Johansen


*FBF:*
Magnus Tausen


*RSF:*
Jan Herman Hansen


*SSF:*
Jon Hestoy


*FFS:*
Valborg Joensen


*BSF:*
Vilhjálmur Gregoriussen


*ÍSB:*
Jógvan Jensen


*JSF:*
Sofus Johannesen


*BTSF:*
Ivan Niclassen


*FÍF:*
Hallur Holm


*RF:*
Hjalmar H. Petersen


*SKF:*
Johnhard Klettheyggj


*SST:*
Andras Joensen


*DSNÍ:*
Harald Eirikstoft


*BSF*
Schandorff Vang

# Sersambondini

*Fótbóltssamband Føroya:*
Christian Andreasen, forseti
Niklas á Líðarenda, varaforseti
Fríðin Ziskason
Niclas Davidsen
Róin Schrøter
Jákup Martin Joensen
Karl Vidtfeldt

*Hondbóltsamband Føroya:*
Kristian Johansen, formaður
Margrið Weihe, næstformaður
Sigvør Matras
Eydna Mikkelsen
Lasse Borðoy
Jón Kragesten

*Flogbóltsamband Føroya*
Magnus Tausen, formaður
Niclas Joensen
Rúna Hentze

*Róðrarsamband Føroya*
Jan Herman Hansen, formaður
Poul John Æðustein,
næstformaður
Hans Dávid Hansen
Súnhild Holm
Paula Eikholm
Jakku Guttesen

*Svimjisamband Føroya*
Jon Hestoy, formaður
Rókur í Jákupsstovu,
næstformaður
Jórun Eið Johannesen
Palli Eysturberg
Sørin S Djurhuus

*Føroya Fimleikasamband*
Valborg Joensen, formaður
Katrin Abrahamsen,
næstformaður
Joan Petersen
Malan Mikkelsen
Óluva Zachariassen

*Badmintonsamband Føroya*
Vilhjálmur Gregoriussen,
formaður
Jógvan Johannesen
Høgni Carlsson

*Ítróttasamband fyri Brekað*
Jógvan Jensen, formaður
Jón á Steig, næstformaður
Johan Samuelsen
Hans Harryson Hansen
Elna Skylv Hansen

*Judosamband Føroya*
Sofus Johannesen, formaður
Zvonko Mrdalo, næstformaður
John Kjær

*Borðtennissamband Føroya*
Ivan Niclassen, formaður
Jens Pauli Nolsøe
Rógvi Thorsteinson

*Frælsur Ítróttur Føroya*
Hallur Holm, formaður
Niels J. Jakobsen, næstformaður
Guttorm Sørensen
Johnhard Larsen
Heini Hátún

*Ríðisamband Føroya*
Hjalmar Petersen, formaður
Óli Johan Láberg, næstformaður
Zacharis Reinert Jacobsen

*Skjótisamband Føroya*
Johnhard Kletteyggj, formaður
Marius Joensen, næstformaður
Magni v. Mouritsen

*Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon*
Andras Joensen, formaður
Evald Rasmussen, næstformaður
Sverri Mohr Edvinson

*Nýstovnaður Ítróttur*
Harald Eirikstoft, formaður
Jón Brekku, næstformaður
Páll Poulsen
Kristian Dahl
Anna Sofía Fjallheim

*Bogaskjótisamband Føroya*
Schandorff Vang, formaður
Jógvan Magnus Andreasen,
næstformaður
Jastrid M. Jensen, nevndarlimur

*Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið INPACT*

# Nevndaryvirlit

*Olympisknevnd Føroya*
Petur Elias Petersen
Petur Ove Petersen
Katrin Joensen

*Oyggjaleikanevndin*
Petur Elias Petersen
Petur Ove Petersen
Katrin Joensen

*Ítróttasdómstólurin*
Anna Dam
Anja Hovgaard
Poul Hansen
Børge B. Hansen
Eyðhild Skaalum
Jóhan Lamhauge, varalimur
Julianna Klett, varalimur
Elna Skylv Hansen, varalimur

*Dopingnevnd*
Jónfinn Thomsen, formaður
Jóhanna Arge
Pál Weihe
Jógvan Ellefsen, varalimur

*Dopingeftirlitsnevnd*
Sofus Johannesen, formaður
Sølvi Winther Olsen, næstformaður
Annika H. Lindenskov, skrivari
Jón á Steig
Petur Oluf Joensen
Jens Jensen

*Ítróttagrunnur Føroya*
Niels Nattestad, formaður
Álvur Hansen, skrivari
Ninna Reinert Ørvarodd
Annika H. Lindenskov
Petur Ove Petersen

*Ítróttasavn Føroya*
Johannes Joensen, formaður
Petur Ove Petersen
Palli Ziskason, kassameistari
Andrass Sólstein, skrivari
Katrin Joensen
Ruben Andresen, varalimur
Sofus Johannesen, varalimur



Góðu feløg, sersambond og stjórnalimir

Vit hava nú aftur høvi at líta aftur á tað, sum vit hava starvast við hetta seinasta árið. Tann mest sjónligi parturin av ítróttinum og tann, ið nemur við hvørja familju her á landi, er tann, sum verður gjørdur úti í feløgunum hvønn dag alt árið. Hetta er gott og rætt – soleiðis skal tað vera. Men tað er sanniliga eisini ein stórur partur, sum verður gjørdur av sersambondunum. Í dag eru vit so komin saman um Ítróttasambandi, sum eftir førimuni roynir at stuðla undir virksemið innan ítrótt her heima.

Okkara vón er, at vit – mangan í tí stilla – kunnu vera við til at geva tí einstaka ítróttafólkinum betri karmar at íðka sín ítrótt.

## Samstarv við tað almenna

Tað hevur alstóran týdning fyri eitt og hvørt sjálvboðið arbeiði, at viðurskiftini við almennar myndugleikar eru góð. Báðir partar royna hvør í sínum lag at stuðla undir og lívga virksemið hjá einstaklinginum. Soleiðis er eisini hjá Ítróttasambandi Føroya. Vit hava eitt støðugt samskifti við almennu myndugleikarnar um felags verkætlanir, felags áhugamál og ikki minst yvirskipaðu karmarnar hjá ítróttinum.

## Heystrøringur

Árini 2009-10 legði tað almenna við „Rørsluárunum“ stóran dent á at fáa øll fólk í Føroyum at røra seg eitt sindur meiri enn vanligt. Hugskotið átti Ítróttasamband Føroya, og vóru feløg og sersambond týðandi partur av tí arbeiði, ið varð gjørt innan ítróttin fyri at gera rørsluárið ítøkiligt.

Seinasta heyst varð skipað fyri sonevndum „Heyst-røringi“ í heystferiuni hjá skúlunum. Yvir 20 ítróttafeløg kring landið lótu dyrnar upp fyri fólki í øllum aldri, so hesi kundu royna alskyns ítrótt. Eini 400 fólk gjørdu brúk av tilboðnum, og tað fegnast vit um. Í onkrum førum valdu fólk at tekna seg sum lim í felagnum, eftir at hava roynt ein nýggja ítróttagrein, og var hetta ein síðuvinningur við tiltakinum. Tað var eitt greitt ynski frá luttakandi feløgunum, at tiltakið verður afturvendandi.




## Kostár og leikmeti

Heilsumálaráðið og Fólkaheilsuráðið hava útnevnt 2011 til serligt „Kostár“, har dentur verður lagdur á at upplýsa um góðar kostvanar. Eins og við rørsluárinum hevur Ítróttasamband Føroya tikið nýggja átakið í størsta álvara. Aftrat upplýsandi virksemi verður arbeitt við einari serligari verkætlan, nevnd „Leikmeti“, ið hevur til endamáls at broyta ósunnu kostvanarnar, sum mangan eru í samband við ítrótt. Útgangsstøðið er, at ósunnir kostvanar mangan standast av, at útboðið av sunnum kosti í einari skjótari vending er ov lítið. Við verkætlanini „Leikmeti“ er ætlanin at hjálpa feløgum kring landið at bjóða ítróttafólkum frukt og grønmeti sum ein sunnan valmøguleika, tá tey íðka ítrótt. Ítróttasamband Føroya samstarvar við Føroya Keypssamtøku um at veita útgerð



at gera rávøruna leskiliga umframt at veita hana fyri ein sámuligan pening.

## Ítróttaavtalan dagførd

Avtalan millum Innlendismálaráðið og Integrationsministeriet í Danmark, sum ásetir undir hvørjum treytum útlendsk ítróttafólk kunnu kappast fyri føroysk ítróttarfeløg, verður dagførd 1. mai á hvørjum ári. Sambært seinastu dagføringini skulu útlendsk ítróttafólk undir ítróttaravtaluni í minsta lagi fáa kr. 9.829,75 um mánaðin frá felagnum. Samstundis kunnu tey í mesta lagi forvinna kr. 9.073,60 í øðrum hjávinnustarvi.

## Skerjingar á fíggjarlógini

Tað vísir seg, at skerjingar eru á øllum økjum á fíggjarlógini. Tað ræður tí um at halda fast sum frægast. Hvør króna, sum kemur til ítróttin er væl givin út, tí hon strekkir so langt í hondunum á sjálvbodnu eldsálunum kring landið. Sambært fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011 skuldi ÍSF skerjast kr. 500.000,- Tíbetur valdi tingið at avmarka hesa skerjingina til kr. 200.000,- Men vit harmast hvøja skerjing, tí hon hevur beinleiðisavirkan á virksemið hjá ítróttarrørsluni. Tað er okkara greiða vón, at politiska skipanin fer at taka ábyrgd og hækka játtanina til ítróttin heldur enn at royna at klípa av henni, tá høvi býðst.

## Nakrar reglur um mvg-afturbering

Játtanin á fíggjarlógini til ítróttarverkløg hevur verið sera lítil seinastu árini. Tá landið kortini hevur viljað stuðlað slíkum verkløgum, hevur verið neyðugt við eini serstakari verklagslóg í tinginum. Í samband við at játtanin til ítróttarverkløg heilt varð strikað við árslok 2009, hevur Løgtingið arbeitt við at evna til eina broyting í mvg-løggávuni, ið hevur við sær, at felagsskapir, stovnar og grunnar, ið gera íløgur fyri meiri enn 1 mió. kr. mvg ikki íroknað, kunnu søkja um at fáa inngangandi meirvirðisgjaldið aftur. Hendan lógin er samtykt við gildi frá 1. januar 2010. Sostatt detta eingi verkløg, sum eru farin í gongd niður ímillum.






## Lokale- og Anlægsfonden

Ítróttasamband Føroya hevur í fleiri ár havt samskifti við almennu myndugleikarnar um at fáa Føroyar við í LOA-grunnin, ið veitir stuðul til verkløg til ítrótt og annað frítíðarvirksemið. Í 2010 eydnaðist loksins at fáa gjørt eina slíka avtalu, og fer hon at bøta munandi um møguleikan hjá feløgum at fáa byggiverkætlanir framdar. Ítróttasamband Føroya var virkið í tilgongdini at fáa avtaluna upp á pláss.

## Avtala við MMR um næmingar á landsliðum

Tað hevur mangan verið ein trupulleiki, at ung, ið eru úttikin til eitt landslið, fáa boð frá skúlanum um, at tey verða skrivaði upp fyri ólógliga fráveru. Tað, sum átti at verið besta og stoltasta løtan hjá teimum, verður í staðin merkt av stúran fyri, hvørjar avleiðingar landsliðsferðin kann fáa fyri lesturin. Hetta er ikki nakað gott grundarlag at umboða sítt land á. Ítróttasamband Føroya fegnast tí um, at avtala er gjørd við Mentamálaráðið, ið fer at hjálpa okkara dugnaliga ungdómi at kappast fyri land sítt við góðari samvitsku.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI

## Ítróttavedding

Havandi skerjingarnar á fíggjarlógini í huga er tað so mikið meira hugaligt, at afturberingin av peninginum, sum føroyingar spæla fyri í spølum hjá Danske Spil, royndist væl hesaferð. Samlaða upphæddin, ið verður útlutað til Ítróttasamband Føroya, Føroya Ungdómsráð og Mentamálaráðið í lutfallinum 60%, 20% og 20%, var heilar 10 mió. og 71. 000 kr., og er hetta næststørsta upphæddin, síðani farið varð undir samstarvið millum Sp/f Ítróttavedding og Danske Spil í 1998. Parturin hjá ítróttinum í hesum er kr. 6 mío. og 43.000 kr.

## ÍSF

## Bygnaðararbeiði

Ítróttasamband Føroya hevur seinnu árini arbeitt við at endurskoða bygnaðin hjá ítróttarsambandinum. Hugt hevur verið eftir valds- og uppgávubýtinum millum Ítróttarsambandið, sersambondini og feløgini. Danski ráðgevin Jan Gudnitz gjørdi í fjør eitt útgreinandi arbeiði, har roynt varð at greina støðuna, sum hon var nú, og har ymsu partarnir innan ítróttarrøsluna fingu høvi at gera vart við sína áskoðan á, hvussu bygnaðurin hóskandi kundi verið í framtíðini. Arbeitt verður áhaldandi við bygnaðinum, og verður ivaleyst eitt uppskot um nýggjan tillagaðan bygnað tøkt innan alt ov leingi.

## Arbeiðið við skráseting

Seinnu árini er eitt ávíst arbeiði gjørt fyri at fáa eina neyvari skráseting av sersambondum og feløgum inni á heimasíðuni hjá ÍSF. Ætlanin er nú at víðka hesa skráseting, so hon eisini kann gerast eitt amboð hjá feløgunum, tá tey skulu skráseta sínar limir. Við nýggju skrásetingini verður eisini lætt hjá ÍSF og øðrum áhugaðum pørtum at fáa fatur á hagtølum um ítróttarvirksemið í Føroyum.




## Skeiðsvirksemi

Ítróttasamband Føroya hevur seinnu árini havt fleiri útbúgvingartilboð til venjarar í feløgunum kring landið, og heldur hetta virksemi fram. Skipað verður fyri grundleggjandi venjaraskeiði fyri barna- og ungdómsvenjarar, eins og skipað verður fyri víðkaðum skeiðum innan ymisk øki. Skeiðini eru tvørítróttalig, og gevur tað skeiðsvirkseminum ein serligan dám.

## Dagførd leiðbeining um skatt og MVG

Leiðbeingin um skatta- og mvg-reglur er dagførd. Endamálið við leiðbeiningini er at lætta um hjá sjálvbodnu nevndarlimunum kring landið, ið mangan verða valdir í nevnd uttan av hava stórvegis innlit í formellu krøvini, sum almennir stovnar seta eitt nú ítróttarfeløgum. Í leiðbeiningini eru allar viðkomandi reglur savnaðar.

## Barna- og ungdómspolitikkur

Arbeitt verður við at orða ein barna- og ungdómspolitikk, og er hann eitt natúrligt framhald av arbeiðinum við at varpa ljós á etikk innan ítrótt, sum Ítróttasamband Føroya hevur lagt stóran dent á seinnu árini.

## Ítróttarsavnið

Ítróttasamband Føroya setti eftir Oyggjaleikirnar í Føroyum í 1989 á stovn eitt ítróttasavn, ið skal arbeiða við at varðveita lutir og tilfar frá føroysku ítróttarsøguni. ÍSF fegnast um, at savnið hevur havt regluligar fundir seinasta árið, og verður ítøkiliga arbeitt við bókaútgávu um søguna hjá ÍSF. Samstundis verða møguleikar kanaðir fyri onkursvegna at skipa eitt atkomuligt savn við lutum frá søguni.

## Ítróttadómstólurin

Fyri at tryggja rættartrygdina hjá feløgum og einstaklingum í føroyska ítróttarheiminum, setti ÍSF fyri nøkrum árum síðani á stovn ein Itróttardómstól, sum í størsta mun tekur sær av yvirskipaðum trætumálum, sum hava fingið sína viðgerð í dómsskipanunum í sersambondunum. Seinasta árið hevur dómstólurin viðgjørt eitt mál – málið um Páll Fanga.

## Dopingeftirlitsnevndin

Ítróttasamband Føroya tekur dopingvandan innan skipaðan ítrótt í størsta álvara. Dopingeftirlitsnevndin skipar á hvørjum ári fyri eini 25 dopingroyndum innan allar ítróttagreinar, sum verða gjørdar í samstarvi við

Anti Doping Danmark. Royndirnar virka bæði sum fyribyrging og eftirlit. ÍSF fegnast um, at einki føroyskt ítróttafólk er tikið fyri doping higartil.

# FELØG OG SERSAMBOND

## Nýtt sersamband

Bogaskjótisamband Føroya varð endaliga staðfest sum 16. sersambandið á aðalfundinum hjá Ítróttasambandi Føroya í 2010. Bogaskjótiítróttin kom til Føroya í samband við Oyggjaleikirnar her í 1989, og vann sær longu í 1997 limaskap í altjóða sersambandinum FITA. Bogaskjótisambandið, sum hevur fýra limafeløg kring landið, er týðandi partur av føroysku oyggjaleikaluttøkuni, og hevur landsliðið í bogaskjóting vanliga vunnið fleiri heiðursmerki í oyggjaleikunum.

## Nýggj feløg

Ítróttasamband Føroya fegnast um, at áhugin hjá eldsálum at stovna ítróttafeløg er stórur. Seinasta árið eru feløgini Smæran, Ternan, FC Giza og Tórshavnar Flogbóltsfelag, Borðtennisfelagið Nykur, Borðtennisfelagið Purkan, HC Kvívík, Skurðin og EB/Streymur tikin upp sum nýggir limir í Ítróttasambandi Føroya.

Eingin greið skilgreinan er av, hvat ítróttur merkir, og hvat eitt ítróttafelag er. Tað er tí upp til stjórnina hjá ítróttasambandinum at meta um, hvørja ferð eitt felag søkir um upptøku í Ítróttasamband Føroya. Tá talan er um verandi ítróttagreinar, er avgerðin vanliga løtt. Tá talan er um nýggjar ítróttagreinar, ella virkisøki, sum ikki eru við í ítróttasambandinum í løtuni, roynir stjórnin við einum kjaki at finna fram til, um felagið skal fáa limaskap. Ein meginregla seinastu árini hevur verið, um felagið íðkar kappingarítrótt ella ikki. Umsóknin frá Dansifrøi í fjør um limaskap í ÍSF varð ikki gingin á møti.

## Tryggingarviðurskifti

Ítróttasamband Føroya hevur eina felags frítíðarvanlukkutrygging, ið tryggjar allar limir í ítróttarfeløgum í Føroyum, sum ikki eru sáttmálasettir. Á hvørjum ári eru tað nógv ítróttafólk, sum so ella so, vegna ítróttaskaðar, fáa ágóða av hesi trygging. ÍSF vil staðiliga heita á feløg, sum hava sáttmálasettar leikarar ella venjarar, at tosa við tryggingarfeløgini um at fáa skipað tryggingar, ið kunnu hjálpa hesum, um tey eru fyri skaða ella vanlukku í ítróttarvirksemi sínum.

## Úrvalsarbeiði

Ítróttasamband Føroya hevur seinastu tvey árini fingið serskylda játtan á landsins fíggjarlóg til úrvalsítrótt. Stjórnin hevur valt at nýta ein stóran part av hesi játtan til at geva svimjaranum Páli Joensen best møguligar fortreytir fyri at røkka hægstu tindar innan svimjing, og hevur hann fingið góð úrslit higartil.

Men ein partur av úrvalsstuðlinum er eisini farin til at menna onnur av okkara ítróttafólkum. Við seminarum fyri einstaklingaítróttafólk, venjarum og til tíðir foreldrum teirra, hevur verið arbeitt við at gera tey tilvitaði um venjing og lívið sum úrvalsítróttafólk. Samstundis hevur hetta arbeiði havt sum mál at geva teimum eitt netverk og eitt umhvørvi, ið tey kunnu stuðla seg at.



Í løtuni veður arbeitt við at gera ein leist fyri, hvussu úrvalsarbeiðið innan føroyskan ítrótt skal skipast í framtíðini.

## Samstarvsavtalan við DOK

Ásannandi at útlit ikki eru fyri sjálvstøðugum føroyskum limaskapi í Altjóða Olympisku Nevndini og harvið sjálvstøðugari luttøku í Olympisku Leikunum í bræði, hevur Ítróttasamband Føroya tikið upp samstarv við Donsku Olympisku Nevndina og Altjóða Olympisku Nevndina við tí endamáli at geva evnaríkum føroyingum møguleika fyri at luttaka í Olympisku Leikunum. Ítøkiliga er eisini avtala gjørd við Altjóða Svimjisambandið FINA, Svimjisamband Føroya og Danska Svimjisambandið, sum loyvir føroyskum svimjarum at umboða Føroyar í øllum altjóða kappingum, samstundis sum teir umboða Danmark í Olympisku Leikunum, uttan at fáa karantenu fyri at skifta tjóðskap. Við hesi avtaluni er ein ítøkiligur trupulleiki loystur við tað, at føroyskir svimjarar, sum t.d. Pál Joensen, sum hava prógvað sítt høga støði í altjóða kappingum, nú hava møguleikan at kvalifisera seg til luttøku í Olympisku Leikunum.




# ALTJÓÐA ARBEIÐI

## Oyggjaleikir

## Isle of Wight

Fyrireikingarnar til teir fjúrtandu oyggjaleikirnar á Isle of Wight í summar eru nú í hæddini. Føroysku ítróttafólkini, ið eru eini 100 í tali, fara at kappast í hesum ítróttagreinum hesa ferð: bogaskjóting, badminton, borðtennis, flogbólti, frælsum ítrótti, golf, skjóting, súkkling og svimjing.

Endaligu úttøkurnar eru gjørdar, og nú er bert aftir hjá ítróttagreinunum at gera seinastu fyrireikingarnar, so úrslitini gerast so góð sum gjørligt. Seinastu oyggjaleikir vunnu Føroyar flestu gullheiðursmerkini, og vónirnar um at vinna heiðursmerki eru góðar. Men útboðið at ítróttagreinum skiftir nakað millum leikirnar, og á Isle of Wight fara vit m.a. at sakna fimleik, judo og triathlon.

Annars seta Oyggjaleikirnir á Isle of Wight í summar met í samlaðum luttakarum. Nú freistin at melda til er farin, er greitt, at heili 3.500 ítróttafólk koma at taka lut á leikunum. Oyggjarnar við flest luttakarum eru: Isle of Wight (316), Guernsey (296) og Jersey (282).

Samlaði føroyski hópurin hesaferð verður umleið 175 fólk, íroknað miðlar og onnur umboð úr Føroyum.










## Oyggjaleikir í Føroyum aftur

Í langa tíð hevur verið arbeitt við at fyrireika eitt boð uppá at skipa fyri oyggjaleikum í Føroyum aftur. Stjórn ítróttasambandsins og almennir myndugleikar hava verið jalig um tiltakið, og hevur ÍSF tí ament boðað Altjóða Oyggjaleikanevndini frá, at vit ynskja at skipa fyri leikunum í 2021. Tað hevur higartil verið hørð kapping millum limaoyggjarnar um at sleppa at skipa fyri leikunum, men Altjóða Oyggjaleikanevndin arbeiðir við at broyta skipanina, soleiðis at tær oyggjar, ið ynskja at skipa fyri leikunum, verða settar í eina røð, soleiðis at áhugagar oyggjar so við og við fáa møguleikan – uttan at skula vinna eina kapping við aðrar oyggjar um leikirnar. Tað er tó ein fortreyt, at Føroyar, eins og aðrar áhugaðar oyggjar, megna at sannføra Altjóða Oyggjaleikanevndina um, at vit megna at skipa fyri einum so stórum altjóða tiltaki, sum oyggjaleikirnir eru. Størstu avbjóðingarnar eru innivist og manglandi umstøður í ávísum ítróttagreinum sum t.d. golf, tennis og skjóting. Umframt dagføringar av ítróttaannleggum.

## Jørgen Petterson í Føroyum

Sum partur av tilgongdini at fáa oyggjaleikirnar aftur hendan vegin hevur ÍSF bjóðað formanninum í Altjóða Oyggjaleikanevndini, Jørgen Pettersson, til Føroya – og vitjaði hann í Føroyum í Januar 2011. Undir vitjanini hitti Jørgen Pettersson m.a. løgmann, mentamálaráðharran og kommunal umboð, og fekk hann á hesum vitjanum staðfest, at oyggjaleikir í Føroyum aftur hava breiðan stuðul – eisini í politiksu skipanini.

## Vitjan í Hetlandi

Petur Elias Petersen, forseti í Ítróttasambandi Føroya, vitjaði somuleiðis í Hetlandi í september 2010 fyri at kanna, hvørjar royndir Hetland gjørdi sær, tá tey skipaðu fyri Oyggjaleikunum í 2005. Á fundum við almenn umboð og umboð fyri ítróttarumhvørvið fekst ein fatan av, hvussu vit eiga at bera okkum at, tá vit skipa fyri leikunum aftur, og hvat vit skulu ansa eftir. Samstarvið millum Føroyar og Hetland varð eisini viðgjørt. Vavið av hesum samstarvinum hevur verið eitt sindur skiftandi, og gera manglandi ferðamøguleikarnir tað trupult í løtuni. Semja var tó um, at hetta samstarv eigur at verða raðfest í framtíðini.

## Komandi leikir

Oyggjaleikirnir í 2013 verða á Bermuda. Hetta er fyrstu ferð, at leikirnir verða hildnir uttanfyri Evropa. Beint eftir oyggjaleikirnar á Isle of Wight í summar verða eyguni tí vend móti fjarskotnu oyggjunum handan hav, og verður luttøkan í teimum leikunum ein stór avbjóðing fyri allar oyggjarnar, eisini Føroyar. Roknast kann við høgum flutningskostnaði, og tí mugu luttakandi ítróttagreinirnar skjótt gera av, hvussu nógvum luttakarum tey ynskja at ferðast við til Bermuda.

Tað er somuleiðis tikin avgerð um, at Oyggjaleikirnir 2015 vera á Jersey, ið eisini skipaði fyri leikunum í 1997. Jersey er ein kanaloyggj, og er hetta umhvørvið kendari fyri okkum enn Bermuda.

## ENGSO

Føroyar hava sum vant tikið lut í tiltøkum hjá evropeiska felagsskapinum fyri ítróttasambond, ENGSO. Aftrat at geva okkum eitt gott netverk, har til ber at fáa samband við onnur evropeisk ítróttasambond, skipar ENGSO á hvørjum ári fyri aðalfundi um várið og ráðstevnu um heystið. Eisini eru ymisk tiltøk fyri ungar ítróttarleiðarar.

## TAFISA

Føroyar gjørdust fyri stuttum limur í altjóða felagsskapinum TAFISA, ið arbeiðir fyri ítrótti fyri øll. Felagsskapurin leggur dent á rørslu, og eggjar limalondunum til árlig rørslutiltøk, umframt at skipa fyri ráðstevnum v.m.

## EOC

Ítróttasamband Føroya hevur seinastu árini luttikið á aðalfundum hjá Evropeisku Olympisku Nevndini sum eygleiðari, og luttóku umboð fyri ÍSF á aðalfundinum í Beograd í desember 2010. Eisini hevur forsetin, Petur Elias Petersen, havt fund við forsetan í EOC, Patrick Hickey, við tí endamáli, at koma nærri einum føroyskum limaskapi í Altjóða Olympisku Nevndini og luttøkuni í Olympisku Leikunum, sum ein slíkur limaskapur hevði givið Føroyum.

## Ráðstevnur

Ítróttarrørslan er fyri øll, og eru bæði kvinnur og menn røsk at taka eina hond í, tá sjálvboðið arbeiði skal gerast. Seinastu árini hevur Ítróttasamband Føroya tikið á seg uppgávuna at stuðla kvinnum eisini at taka politiska ábyrgd innan ítróttarørsluna. Við ráðstevnu í vár varð ljós varpað á týdningin av at hava bæði kynini umboðaði í nevndum og ráðum.

Ítróttasamband Føroya luttók eisini á ráðstevnu um felagslív í Danmark, og vísir tað seg, at avbjóðingarnar hjá ítróttafeløgum eru tær somu í øllum Norðurlondunum.








Skipað hevur eisini verið fyri øðrum tiltøkum, ið hava havt til endamáls at varpa ljós á útvald evni innan ítrótt. Úr rúgvuni kann nevnast fyrilesturin um „Performance Optimering“, sum DSNÍ og ÍSF skipaðu fyri í vár.

## Sendirættindi

Føroyski miðlaheimurin er í broytingartíð. Fleiri og fleiri miðlar koma, og er ítrótturin mangan ovast á ynskilistanum, tá tað kemur til at fáa tilfar at senda. Ítróttasamband Føroya fegnast um, at tað er so stórur áhugi fyri førosykum ítrótti millum miðlarnar.

## Avtalan við 10'aran

Avtalur eru við Kringvarp Føroya og Miðlahúsið um sendirættindi til føroyskan ítrótt. Og í august 2010 varð avtala gjørd við sjónvarpsrásini 10'aran, ið sendir í pakkanum hjá Televarpinum. 10'arin ynskti at senda upptøkur av føroyskum ítrótti – bæði frá kappingum









og aðrar sendingar um ítrótt, ið eru framleiddar. 10'arin røkkur til umleið 80% av húsarhaldunum og arbeiðir við at útbyggja sendinetið.

## Tøkk

Eg fari at enda at takka tykkum øllum fyri gott samstarv seinasta árið. Mangar góðar og spennandi løtur hava verið, og síggja vit fram til eins góðar løtur komandi árið – ikki minst á Oyggjaleikunum á Isle of Wight í summar.

Tað eru so nógv, ið geva sítt íkast til, at ítróttarvirksemið her á landi er so stórt. Tað er vónleyst at nevna øll, men vil eg her draga nakrar høvuðsbólkar fram.

Teir sjálvbodnu leiðararnir, venjararnir og nevndarlimirnir eiga lívið í ítróttinum. Uttan tykkum var eingin kapping, eingin venjing, ja eingin ítróttur.

Tey aktivu ítróttafólkini – uttan mun til ítróttarligt støði – eru fyrimyndir hjá okkum øllum, ikki minst tá tað kemur til ynskið hjá okkum um at røra okkum eitt sindur meiri, at eta eitt sindur sunnari, og í heila tikið at liva eitt sindur betur.

Myndugleikar – almennir og kommunalir – skapa fysisku og fíggjarligu karmarnar kring virksemið hjá okkum. Í flestu førum er talan um fólk, sum brenna fyri ítróttinum eins og tú og eg. Atlit skal takast til nógv ymisk áhugamál og tørv hjá ymsum bólkum, tí eiga vit at fegnast um hvørt átak, sum verður gjørt ítróttinum at frama.

Annar týðandi partur av fíggjarliga grundarlagnum undir ítróttarrørsluni eru teir mongu sponsorarnir – stórar sum smáar fyritøkur, lokalar, landsumfatandi og altjóða, sum seta pening og orku av til at fíggja ítróttarligt virksemi.

Uttan fjølmiðlarnar vóru tað bert tey fáu, ið fingu fylgt við gongdini innan ítróttin kring landið og úti í heimi. Ítróttarredaktiónirnar á miðlunum eru mannaðar vit nøkrum av mest eldhugaðu ítróttarfjepparunum, sum vit hava; og tað fegnast vit um. Við tykkara innlivan megna tit at fáa okkum spent í ítróttargreinum og -hendingum, sum vit annars ikki kenna nakað til. Eitt gott dømi um hetta er ótroyttiliga arbeiðið, tit gera í samband við Oyggjaleikirnar.

Vit líta við takksemi aftur á farna árið innan ítróttarheimin, og líta við spenningi móti komandi ári.





## Býti av landskassastuðli




## Býti av inntøkum frá ítróttarvedding



## SERSAMBOND 2010/2011 SKEIÐ

